# Eru tað italiumenn ella pólendingar sum ráða í Føroyum?

TRYGVI F. GUTTESEN



Í 60 ár hava vit hoyrt somu plátu frá loysingafólkunum, teir vita helst ikki, hvussu plátan skal vendast, og tískil mega vit hoyra tað sama lagið ár undan ári, og tað ljóðar soleiðis:

"Í Føroyum skulu føroyingar ráða "

Eru tað ikki bara føroyingar, sum manna okkara lógevandi ting – løgtingið? Okkara landsstýri, øll okkara bý-og bygdaráð og allar okkara leiðslur innan tað almenna og privata?

Gamaní, onkur dani er at finna í okkara umsiting, men kortini ikki í nær námind so nógv sum føroyingar, ið starvast innan donsku umsitingina.

Føroyingar hava umboðan og atkvøðurætt í danska fólkatinginum, meðan danir hava kvørki umboðan ella atkvøðurætt í okkara løgtingi, so her er niðurstøðan greið:

Í Danmark ráða føroyingar og danir saman við grønlendingum, men í Føroyum eru tað bert føroyingar sum ráða.

**Øll eru sjálvstýrishugað!**

Í 60 ár hevur staðið okkum í boði at fara úr verandi samríki, og eingin kann forða okkum í at loysa. Heimastýrislógin røkkur líka at loysingini, og nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum røkkur eisini líka at loysingini. Við hesari vitan kennist tað bæði løgið og óskiljandi at lesa og hoyra, hvussu politikkarar, samfelagsfrøðingar og serliga fjølmiðlar framhaldandi flokka allar føroyingar í sjálvstýris- og sjálvsbjargnishugað. Slíkan málburð kundi tú brúka í 1930 men als ikki í dag.

Hetta minnir ikki sørt um royndirnar at flokka føroyingar í kristnar og ókristnar politiskar flokkar.

ABC-samgongan gjørdi munin meira við sjálvstýri og sjálvsbjargni enn fulveldissamgongan, hóast hon var mannað við tveimum samríkisflokkum, men kortini verður nú aftur rópt eftir eini loysingasamgongu, sum í seks ár prógvaði, at hon als ikki megnaði at geva okkum størri sjálvstýri ella størri sjálvbjargni.

Tað munnu vera fá menniskju, ið hava størri frælsi og sjálvræði enn føroyingar, men tað vil ikki siga, at vit ikki framhaldandi skulu arbeiða fyri enn meira sjálbjargni, tí tað er nakað sum allir føroyingar ynskja.

**Blokkurin og yvirtøkur**

Í dag er eingin politiskur flokkur ímóti at gera fleiri yvirtøkur, um tað verður gjørt við fullari gjaldsskyldu. Besti háttur at tryggja og menna okkara vælferð, sjálvstýri og sjálvbjargni, er at fáa hesar yvirtøkurnar at virka, og síðan at yvirtaka fleiri økir, soleiðis sum tilskilað í nýskipanaruppskoti sambandsfloksins. Tá minka vit við viðring um blokkin, og tá kemur dagurin, har vit við fólkaatkvøðu skulu velja millum ríkisfelagsskap, frælsanfelagsskap ella fulla loysing.

Tann samgongan, sum best kann røkka hesum máli er : B+C+D, men hon hevur í dag bert 15 tinglimir, og tiskil er neyðugt at taka A ella E við, men ein B+D+E-samgonga er eisini ein møguleiki.

# Det grå terapimarked rykker til Færøerne

GRETE LIV PEDERSEN
sproglærer

I Danmark er det grå terapimarked vokset betydeligt i de sidste 15-20 år og nu udbydes disse »grå« tilbud også udenfor landets grænser.

Det er et helt ureguleret og privat område i Danmark og kvaliteten og det faglige indhold i uddannelserne til psykoterapeut er meget forskellige både i indhold og i kvalitet. Ingen af dem er certificerede eller har nogen offentlig anerkendelse, akkreditering, kvalitetssikring eller evaluering på nuværende tidspunkt.

Overvejer man at melde sig til et af de utallige tilbud vil jeg opfordre til at man ser sig rigtig godt for, fordi man er helt uden sikkerhed for kvaliteten i det faglige indhold og der er ingen uvildige klagemuligheder.

Der er tidligere brugere, kursister og klienter som har kørt klageforløb over uddannelsessteder, de såkaldte institutter og over psykoterapeuter som er registrerede medlemmer af den største brancheforening indenfor området Psykoterapeutforeningen som klart har overtrådt etik, moral og faglighed, som den er beskrevet i foreningens vedtægter uden at det har haft nogen konsekvenser for dem og de indklagerede terapeuter og uddannelsessteder fortsætter stadig deres virksomhed og legitimerer sig med medlemskabet i Psykoterapeutforeningen MPF.

Det er selvfølgelig helt uacceptabelt.

Så derfor dette indlæg så læserne har mulighed for at orientere sig på et bredere, kvalificeret grundlag og set med en brugers øjne.

Man har fra ministeriel side efter klager fra borgere startet et kvalitetssikrings og evalueringsforløb i 2005, som resulterede i en pjece om kvalitetskriterier og et påbegyndt evalueringsforløb med Evalueringsinstituttet EVA og 10 tilmeldte uddannelsessteder.

Dette forløb stoppede imidlertid på grund af ikke nærmere beskrevne samarbejdsvanskeligheder.

Og det er ikke blevet fulgt op på anden måde, end at ministeren har henvist uddannelsesstederne til selv at finde evalueringsmuligheder, hvis de vil.

Der er nu indledt et evalueringsforløb som Psykoterapeutforeningen har taget initiativ til med et firma Reflektor og 11 uddannelsessteder.

Dette forløb vil jeg betegne som en discountudgave af det oprindeligt tænkte og der vil stadigvæk ikke være nogen uvildig klagemulighed for brugerne.

Så området er ikke blevet mindre gråt snarere mere siden 2005 hvor kvalitets pjecen blev udgivet.

Der er penge at tjene for forholdsvis lavt uddannede og entreprenante mennesker og denne terapi og coaching kultur støttes af en nyliberalistisk tidstrende, hvor den kommercielle markedsgørelse breder sig ind over alle livsområder og hvor man blander management tankegangen med new age inspireret nyreligiøsitet og forskellige former for terapi, som er en del af tidsånden i mange miljøer.

Det er selvfølgelig uacceptabelt og slet ikke pengene værd for den form for virksomhed endsige etisk, moralsk og fagligt i orden indenfor et humanisktist fagområde som psykoterapi er.

**Man kan læse mere i bøgerne:**

Fra krise til kaos af Annie Dickmann www.annie-dickmann. I Livets strøm av Chili Turell. Selvmål af Karen Lisa Salomon. Kritiske diskussioner af en grænseløs udviklingskultur red. Svend Brinkmann, Cecilie Eriksen kvalitetskriterier.dk

# Lovað altjóða universitet í Føroyum

*Tíðindaskriv frá MFS*

Nærum allir politisku flokkarnir lovaðu undir valstríðnum altjóða universitet í Føroyum. Hetta fegnast vit í MFS um. Nú er at vóna at givin lyftir verða hildin. Vit heita á allar flokkar, um at raðfesta hetta málið komandi valskeið, serstakliga teir, sum sita og samráðast. Alneyðugt er at fáa hetta við í samgonguskjalið.

**Hví universitet í Føroyum?**

Fróðskaparsetrið bjóðar útbúgvingar á universitetsstøði, men alneyðugt er at raðfesta Fróðskaparsetrið nógv hægri. Í fyrstu atløgu halda vit tað vera neyðugt at miðsavna allar útbúgvingar og øll lesandi á einum stað. Tað fer at bera við sær, at vit kunnu menna eitt rættuligt lestrarumhvørvið í Føroyum. Við hesum høvdu fleiri valt at lisið í Føroyum. Harvið verður størri grundarlag fyri at økja um talið á útbúgvingum.

Eitt universitet hevur stóran týdning fyri føroyska samfelagið. Her ber til at vísa á fleiri fyrimunir. Eitt nú gevur universitetið føroyskum lesandi møguleika at taka útbúgving, ella ein part av útbúgvingini í Føroyum. Almenni og privati arbeiðsmarknaðurin kann nýta gott av hesum og hetta vil elva til, at fleiri høgt útbúnir føroyingar velja at nýta sínar førleikar í Føroyum.

**Altjóða universtitet**

= Fleiri ung í Føroyum
+ Fleiri útbúgvingar
+ Fleiri høgt útbúgvin fólk á arbeiðsmarknaðinum
+ Fleiri samstørv við útlendsk universitet
+ Fleiri møguleikar til skiftislestnað millum lond
+ Fleiri granskingarmøguleikar
+ Fleiri samstarvsmøguleikar við vinnuna

Samanumtikið fleiri møguleikar fyri alt samfelagið.

**Nøkur vallyfti**

Flest allir flokkar hava lovað at menna hægri útbúgving í Føroyum komandi valskeið. Her ber til at lesa nøkur av vallyftunum:

Fróðskaparsetrið verður ment til altjóða universitet, ið granskar og undirvísir á altjóða støði í tøttum samstarvi við universitet og lærustovnar í grannalondunum og longri úti í heimi. Lesandi taka partar av síni útbúgving í Føroyum og aðrar partar uttanlands.
**(Tjóðveldi)**

Hægri útbúgvingar verða samskipaðar í ein lærdóms- og granskingarmiðdepil, Fróðskaparsetur Føroya. Tað skal tryggja samfelagnum og vinnuni viðkomandi útbúgvingar á hægsta altjóða stigi, eins og gransking verður raðfest og samskipað á hægsta stigi.
**(Fólkaflokkurin)**

Fróðskaparsetrið lyftast á eitt altjóða støði. Guðfrøðilesandi uttanfyri Danmark javnsetast.
**(Miðflokkurin)**

Vit skulu skipa hægri útbúgving og gransking í Føroyum. Málið skal vera, at øll skulu kunna byrja og enda vanligar hægri útbúgvingar í Føroyum. Føroyskar útbúgvingar skulu vera so góðar, at útlendingar koma til Føroya at lesa.
**(Sjálvstýrisflokkurin)**

Granskingarumhvørvið skal mennast, og teir uppløgdu møguleikarnir skulu dyrkast, t.d. biotøkni, matvørur, havumhvørvi og klimagransking. Vinnuháskúlin skal gerast til ein altjóða hægri lærustovn við sjóvinnuútbúgvingum. Hægri fiskivinnuútbúgving skal setast á stovn í Føroyum.
**(Sambandsflokkurin)**

# Ein heilsan til Apuvitið í vesikummuni hjá Carl Jóhan Jensen

## (Bókasíðan í Sosialinum 25.01.08)

REGIN EIKHÓLM



APUVit og HeimaStýri – ritlinga heiti
Ein roynd á surrrealistiskum heimastýrisbeiti
Fáfongdu fjøld tað at útgreina
At EG aleina veit
Hvat HVØRKI skal meina

Listin undir trongum korum
Helst tí er at finna í vesi-kummu-forum
Samleikan hvar finni EG hann
Bjóði tí HVØRKI komm-ann

Royni sum best MÍTT syntetiska mál
Eitt sindur av filosofi – tó uttan sál
Her er onki MÁL

Sjálvt dansurin fer mær framvið
Kanska mangli EG pli

HVØRKI halt uppat og bið!

**PS:** Týski satirikarin, Christoph Lichtenberg (1742-99) sigur:
"Tá ein apa hyggur í ein spegil, kann eingin ápostul hygga út".